# Vælkomin á Eystanstevnu 2004

**Býráðið hevur saman við ítróttarfeløgum, áhugabólkum og samkomum roynt at gjørt karmarnar um Eystanstevnuna so góðar sum gjørligt. - Tí vóna vit, at undirtøkan fyri stevnuni hesaferð verður eins góð, og undirtøkan var seinasta ár, sigur býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Vegna Runavíkar býráð bjóðar Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, øllum vælkomnum á Eystanstevnu, sum verður um vikuskiftið. Í ár eru 43 ár liðin, síðan fyrsta Eystanstevnan varð hildin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, bjóðar vegna býráðið øllum vælkomnum á Eystanstevnu.

– Eystanstevnan er ein av teimum týðandi summarstevnunum, har kappróður og aðrar ítróttargreinir hava sín stóra týdning fyri ítróttarfeløgini og tey, sum koma at njóta hesi tiltøk.



*Nógv fólk vitjaðu á Eystanstevnu í fjør, og fyrireikararnir vóna, at undirtøkan í ár verður eins góð og seinasta ár*

### Hugnalig tíð

Rodmundur ásannar, nú Eystanstevna verður um vikuskiftið, at tíðin, tá ið summarítrótturin er í hæddini, er ein ógvuliga spennandi og hugnalig tíð.

– Áhugavert er at fylgja við í teimum ítróttargreinum, sum nú einaferð liggja einum nærmast, tað veri seg í fótbólti, kappróðri ella øðrum ítróttargreinum, sum hvør einstakur nú einaferð hevur áhuga fyri.

Býráðsformaðurin fegnast eisini um, at tað hevur eydnast teimum, sum samskipa tiltøkini, at gera eina fjølbroytta skrá, sum kann hava eina so breiða undirtøku millum gestirnar sum gjørligt.

### Stóran týdning

Í ár eru 43 ár liðin, síðan fyrsta Eystanstevnan varð hildin.

– Nógv er broytt hesi árini, men týdningurin av at halda summarstevnur er eins stórur og áður.

– Hesar dagarnar, stevnan er, leggja flestu av okkum vanliga gerandisdagin til síðis og luttaka í teimum ymisku og fjøltáttaðu tiltøkunum, sum eru á skránni – bæði til gamans og álvara.

Hann vísir á, at nógv ymisk tiltøk eru á skránni til hesa Eystanstevnuna, sum byrjar í dag og heldur fram til sunnudagin.

– Býráðið hevur saman við ítróttarfeløgum, áhugabólkum og samkomum roynt at gjørt karmarnar um stevnuna so góðar sum gjørligt. Tí vóna vit, at undirtøkan hesaferð verður eins góð, og undirtøkan var seinasta ár, sigur býráðsformaðurin.

### Vælkomin!

Vegna Runavíkar býráð takkar Rodmundur Nielsen øllum teimum, sum hava tikið tøk og hava skapt grundarlag fyri eini góðari Eystanstevnu.

– At enda bjóða vit øllum hjartaliga vælkomnum inn á Skálafjørðin um vikuskiftið.

# Listaframsýning í handlinum hjá Olivari

**Jørgin Olsen er ein áhugaverdur listamálari sum málar nattúralistiskar málningar**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Eystanstevnu hevur listamaðurin, Jørgin Olsen úr Runavík, framsýning í gamla handlinum hjá Olivari.



*Ein av málningunum hjá Jørgini Olsen, har motivið er Skálafjørðurin*

Framsýningin verður opin leygardagin og sunnudagin, og hon letur upp klokkan 15.

Jørgin Olsen er ein áhugaverdur listamálari, sum serliga málar náttúruna og tað, sum rørist í henni og rundan um hana.

Málningarnir hjá honum eru vakrir og eru nógv eftirspurdir millum tey, sum hava áhuga fyri list.

Jørgin Olsen sigur, at øll eru hjartaliga vælkomin oman í Gamla handlilin hjá Olivari á Eystanstevnuni.



# Slupptíðin í myndum og lutum

**Aftur í ár skipar bygdasavnið, Forni, fyri eini evnisframsýning. Hesaferð er evnið slupptíðin**

EYSTANSTEVNA
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Á hvørjum ári skipar Forni fyri minst einari evnisframsýning. Hesaferð lýsir framsýningin - við myndum og lutum - slupptíðina*

Gjøgnum árini hevur bygdasavnið, Forni á Glyvrum, skipað fyri fleiri evnisframsýningum. Tann fyrsta var í 1988 og lýsti roykstovuna og annað í húsinum frá gamlari tíð.

Evnisframsýningarnar hava verið um 20 í tali, og hava snúð seg um eitt nú hersetingina, um tá kirkjan var einsamøll, til andaligu rørslurnar tóku seg upp, Heiða-doktaran, klæðir upp til eftir seinna heimsbardaga og mangt annað.

Í nógv ár hevur innsavningin av lutum og myndum vaksið um savnið, og í dag er savnið bæði umfatandi og áhugavert. Húsið er innrættað við eini gamlari stovu frá 1874, gomlum handli frá fyrsta helmingi av farnu øld, køki og gomlum kamari. Á framsýningini eru bæði fornlutir og myndir. Lutirnir, sum eru at síggja, eru eitt nú amboð, brúkslutir og innbúgv. Nógvu gomlu myndirnar lýsa dagliga yrki, bæði á sjógvi og landi.

Bygdasavnið Forni er avgjørt eina vitjan vert. Opið er bæði leygardagin og sunnudagin á Eystanstevnu frá klokkan 15.00 til 19.00.



*Tað hevur eydnast bygdasavninum, Forni, at savna hópin av lutum frá gamlari tíð. Húsið á Glyvrum, sum savnið heldur til í, er innrættað við gamlari stovu, køki, kamari og handli. Eisini eigur savnið hópin av gomlum myndum og ættartalvum*



*Millum mongu forvitnisligu lutirnar á savninum er hesin barnavognurin, sum varð keyptur í Onglandi í 1944. Um nærum allar lutirnar á savninum veit Maria eitthvørt áhugavert og spennandi at siga*



*Hetta er dópskjólin hjá Rasmusi uppi í Toftum, sum livdi frá 1863-1933. Mamma hansara seymaði hann. Helst varð kjólin ætlaður systir hansara, Onnu Mariu, sum varð fødd árið fyri, men doyði bert ein dag gomul. Kjólin hevur verið varðveittur norðuri í Buð í Hvannasundi, og nógv børn har eru doypt í honum. Tað var Lena í Buð, sum í 1996 læt savninum dópskjólan og greiddi frá honum. Rasmus var abbi Mariu Jacobsen á Glyvrum, sum er leiðari á Forna*

# Broytt ferðsla á Eystanstevnu

**Eingin gjøgnumkoyring verður á stevnuøkinum, meðan Eystanstevna er**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Eystanstevnu verða nakrar broytingar gjørdar í ferðsluviðurskiftunum í Saltangará.

Skipanin verður hon, at frá hóskvøldinum, 11. juni klokkan 19 til sunnukvøldið, 13. juni klokkan 21, verður eingin gjøgnumkoyring á stevnuøkinum. Tað merkir, at Heiðavegurin verður stongdur frá Deild C og út til Teymavirkið. Í tíðini, meðan hesin parturin av Heiðavegi verður stongdur, verður ferðslan beind eftir vegnum á kaiøkinum hjá Runavíkar Havn.

Meðan stongt er, ber tó til at koyra til handlarnar, sum liggja millum Føroya Banka og Brotið, og til ber eisini at koyra frá Sjómansheiminum í Runavík og inn til Teymavirkið í Saltangará.



*Á Eystanstevnu verður ferðslan á einum parti av Heiðavegi løgd um, soleiðis at bilarnir verða beindir eftir vegnum á kaiøkinum hjá Runavíkar Havn*